# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# PSA og Mitsubishi samstarv

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Japanskir fjølmiðlar upplýsa at í hesum døgum eru samráðingar millum fronsku bilkonsernina PSA (Citroën og Peugeot), og Mitsubishi í Japan. Talan er um at PSA skal keypa millum 30 og 50 prosent av partabrøvunum í Mitsubishi.

Tá tíðindini bórust vaks virði av partabrøvini í Mitsubishi við 13,4 prosentum, skrivar Nikkei Business Daily í Japan.

PSA og Mitsubishi hava í nøkur ár samstarvað um ymiskar bilar. Tað er t.d. Mitsubishi sum framleiðir Mitsubishi Outlander, sum eisini verða gjørdir sum Peugeot 4007 og Citroën C-Crosser.

Eisini er samstarv teirra millum um el-bilar.

*Citroën C-Crosser, Mitsubishi Outlander og Peugeot 4007 eru somu bilar við hvør sínum identiteti*









*Sigurbjørn Ragnarsson frá Bilrøkt*

# Fjølbroytt Bilradio

**Í sendingini Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 17.15 eru samrøður við Sigurbjørn Ragnarsson frá flutningshjálpini hjá Sp/f Bilrøkt í Havn, Jens Mortan Rasmussen frá Sp/f Umhvørvisportrinum á Strondum og við Jógvan Hans Joensen í Miðvági**


*Jógvan Hans Joensen*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Bilradio er við Sigurbjørn Ragnarsson frá flutningshjálpini hjá Sp/f Bilrøkt, sum koyrir kring landið og gevur hjálp til uppstøðgaðar bilar, og bilar sum av eini ella aðrari orsøk standa í vegin fyri ferðsluni ella eru farnir út av vegnum. Prát er eisini við Jens Mortan Rasmussen frá Sp/f Umhvørvisportrinum, sum hevur fingið umhvørvisgóðkenning til upphøgging av bilum á Strondum.

Eisini verður ein samrøða við Jógvan Hans Joensen frá Mylluni í Miðvági endursend. Jógvan Hans hevur nógv áhugavert at siga frá, m.a. hvussu tað var at taka koyrikort, tá hann var ungur, og um at hann einaferð varð eitraður av at arbeiða í eini garasju, meðan ein bilmotorur var í gongd. Samrøðan við Jógvan Hans varð gjørd í sambandi við at 50 ár eru liðin, síðan hann keypti sín fyrsta hýruvogn og byrjaði sítt virksemi í 1959.

# Golfurin góð útflutningsvøra

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Av øllum týskum bilum er VW Golf tann best umtókti. Nýggj hagtøl vísa, at higartil í ár er Golfurin tann mest útflutti bilurin í Týsklandi. BMW-3 serian og Ford Fiesta eru ávikavist nummar tvey og trý.



*VW Golf er tann mest útflutti bilurin í Týsklandi*